# 8 spurningar um jól

## Elin Hentze í Stórustovu

***Hvat er tað besta við jólunum?***
Tað besta við jólunum er hugnin við familjuni. At fara til ymisk jólatiltøk við børnunum, til jólafest í barnagarðinum, gera jólapynt o.s.fr. Vit hava eisini altíð eitt kvøld, har vit øll í familjuni gera marcipan í nissuhúgvum, meðan vit lurta eftir jólatónleiki ella jólaheilsanum. Tað er sera hugnaligt:)

***Hvat er tað keðiligasta við jólunum?***
Haldi ikki nakað sum so er keðiligt við jólunum. Tó kann man gerast eitt sindur kløkkur, tá kontoavritið kemur í januar, tí desember mánaðin er dýrur :)

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
Tað er ikki so stórur munur á, hvussu eg helt jól sum barn, og so nú. Men nú eru tað børnini, sum fáa allar jólagávurnar, og ikke eg:) Jólaaftan hava vit altíð hildið saman við babbasa familju, og jóladag saman við familjuni hjá mammu, og nýggjársaftan hjá ommu og abba.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Eg veit faktiskt ikki enn, hvussu jólini verða. Men tað verður neyvan tann heilt stóra broytingin. Ætli at slappa av saman við mínum kæru, eta góðan mat. Má nok eisini rudda út, fyri at fáa pláss fyri øllum gávunum børnini fáa :)

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Mær dámar væl res, og ikki minni í desember mánaði. Tað at ganga og keypa jólagávur, kann vera sera hugnaligt (um man bara ikki hevur nakað mannfólk við sær;)

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Nei, tað havi eg ikki. Vit tosaðu um at halda jól uttanlands í ár, men tað varð ikki til nakað. Men fyrr ella seinni verður tað nokk. Eg sigi sum løgmaður, at hevur man familjuna hjá sær, kunnu jólini haldast allastaðni.



**Keypir tú sjálv tínar jólagávur?**
Ja, eg keypi okkara jólagávur, fyri mammu og tey, og fyri ta einu ommuna, so tað loypir skjótt up. Plagi faktiskt eisini at finna allar tær gávurnar, sum eg sjálv ynski mær, og so sigi eg við familjuna, hvat tey skulu keypa. Tað halda nøkur av teimum er nakað tvætl, tí so veit eg longu hvat eg fái. Tað kann so eisini vera nakað um tað.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Eg ynski fyrst og fremst at tað verða eina góð og hugnalig jól ... Undir jólatræið? Eitt videokamera. Vit høvdu eitt, sum eg brúkti nógv, men tað er kaput, so onki er filmað í langa tíð. Tað sakni eg.


























